


Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

# EM-síðan

*www.euro2000.org er navnið á síðuni, har líkt og ólíkt er at finna um EM-endaspælið*

JÁKUP MØRK

Hjá veruliga fótbóltselskaranum er als ikki nóg mikið, bert at sígja einar tveir dystir um dagin í sjónvarpinum.

**Fylgja við**
Nei, skal alt fáast við, er eisini umráðandi at fylgja við í tí, sum fyriferst kring tey einstøku liðini.

Nógv av hesum ber sjálvandi til at lesa í bløðunum, hoyra í útvarpinum og síggja í sjónvarpinum, men skalt tú veruliga vera on-line, er bert eitt stað at vera, og tað er sjálvandi á alnótini.

Nógvar síður eru sjálvandi, har til ber at fylgja við gongdini. Flestu bløðini um okkara leiðir hava sína síðu, vælkenda soccernet hevur sjálvandi sítt og so framvegis.

Eisini er ein síða, sum kann breggja sær av at hava heitið, official site, og tað omanfyrinevnda www.euro2000.org.

**Mangt og hvat**
Á hesi síðu ber til at lesa snøgt sagt alt, sum hevur við EM-endaspælið at gera. Eftir at hava valt, á hvørjum máli tú vilt lesa síðuna, er bara at fara í gongd.

Beinanvegin, sum tú kemur inn á síðuna, er eitt stutt yvirlit, har feskastu tíðindini eru skrivað í stuttum. Við at trýsta á tíðindastubban, ber sjálvandi til at lesa meira um málið.

Er tað eitt serligt land, sum hevur tín áhuga, ber sjálvsagt til at velja seg inn á hetta, so bert tiðindi, sum viðvíkja hesum landi, eru at síggja.

Umframt hesar møguleikar, er hópin av øðrum slóðum so lætt er at finna júst tað, sum hevur tín áhuga.

Hevur tú áhuga í EM-søguni, ber til at lesa um hesa. Minnist tú ikki, hvussu liðini komu til EM, er yvirlit vyir allar dystir í EM-undankappingini. Nágreinulig hagtøl fyri hvønn dystin sær í endaspælinum er sjálvandi at finna.

**Kanningarnar**
Stuttligasti parturin av síðuni er to helst tær sonevndu polls, har til ber at gera sínar egnu metingar um okkurt aktuelt evni.

T.d. kann síggjast:

- At lesarar av síðuni meta, Schmeicel framvegis er besti málverji í Europa.

- At Holland er landið, sum verður mett at hava bestu møguleikarnir at vinna endaspælið.

- At KluivertBergkamp verða roknaðir sum vandamesta álopsparið.

**Óteljandi møguleikar**
Omanfyri hava vit bert nevnt heilt fáar av teimum evnum, sum til ber at lesa um á síðuni.

Ein gjøgnumgongd av øllum møguleikum hevði verið alt ov umfatandi til at skrivað í stuttum, men hevur hetta vakt tín áhuga, ber til at kanna eftir sjálv/ur.

Púra vist tykist tó vera, at hetta er »síðan« hjá teimum, sum alla tíðina vilja hava fingurin á pulsinnum, meðan bóltarnir rulla í Hollandi og Belgia.




*Ein partur av skermmyndini á heimasíðuni*

# Súkkling á Eystanstevnu

*Aftur hetta vikuskiftið verður kappsúkkling á skránni, og aftur hesafer sleppa børn og ung at royna seg.*

Leygarkvøldið verður kappsúkkling á keiøkinum í Runavík. Súkklað verður Býarkoyring, og koyrt verður í 50 minuttir. Síðani ringir ein klokka og so er bert eitt umfar eftir.

Teinurin, ið koyrdur verður, er frá Eysturoyar Heilsølu, niðan ímóti Runavíkar Sjómansheimi, eftir Rókarvegi og aftur á Fjøtuveg.

Meðan ung og vaksin koyra hendan tein, so koyra børnini runt um Timburhandilin.

**Jóhann við aftur**
Hetta er annað umfarið av Grand Prix Føroyar, og í løtuni er tað Gunnar Dahl-Olsen, sum liggur fremst hjá monnunum, eftir at hann vann sannførandi sigur á norðoyastevnu. Ísak Sambleben liggur ovast hjá mansunglingum og Ann Zachariassen liggur ovast hjá kvinnuunglingum.

Kári Brattaberg gjørdist nummar tvey í fyrstu kappingini og Sverri M. Edvinsson nr. 3, men spennandi verður at síggja hvussu leikur fer á Eystanstevnu, tí leygardagin verður Jóhann Brend við aftur.

Jóhann hevur búð í Danmark seinasta árið. Hann súkklar við CC Gladsaxe og tað hevur gingið hampuliga væl hjá honum, í teimum 7 kappingunum hann higartil hevur luttikið í.

**Tveir bólkar hjá børnum**
Børnini eru býtt sundur í tveir bólkar: 5 til og við 9 ár og 10 til og við 14 ár. Gentur og dreingir kappast fyri seg, og heiðursmerkir verða latin til nr. 1, 2 og 3.

Tey vaksnu súkkla kl. 18 og børnini kl. 19.00.

Vinnarin av einari kapping fær 40 stig, nr. 2 34 stig og nr. 3 fær 30 stig.



*Allarhelst fara hesir tríggir at standa seg væl*

# Nýggjar og gamlar dygdir

*Fyri fyrstu ferð í søguni vann Italia á Belgia í einum týðandi dysti*




*Undan endaspælinum vóru mong, sum einki vistu um Fiore, men nú hevur hann so gjørt sítt til at verða kendur*

JÁKUP MØRK

Tað vóru fyrst og fremst gomlu italsku dygdirnar, sum viðførdu, at azur-bláa liðið mikukvøldið kundi tryggjað sær sess í fjórðingsfinaluni.

**Heingilásið**
Eftir at Totti longu i sætta minutti hevði lagt Italia fram um við einum frálíkum stútara, løgdu rómverjarnir dent á verjupartin.

Júst verjuparturin er tann dygdin, sum fótbóltsáhugað minnast best frá italskum liðum upp gjøgnum seksti og sjeyti árini.

Byrjanin til hetta var Inter liðið, sum í seksti árunum spældi við tí sonevndu catanaccio-skipanini , har tað fyrst og fremst ráddi um at tryggja seg í verjupartinum. Serliga tá leikt varð á útivølli í europeiskum høi, nýtti Inter hesa spæliskipan, og eisini landsliðið nýtti hesa í sínum spæli.

Sostatt kom Italia í 1970 víðari úr bólkaspælinum í HM í 1970 við málmuninum 0-0! Kanska ikki nakað serliga undirhaldandi, men fram til finaluna komu teir so.

**Eisini í álop**
Mikukvøldið var talan tó ikki um nakað heingilás á italska liðnum, men kortini vóru teir sera tryggir í verjupartinum.

Belgiska liðið hevði nakrar góðar royndir, men hesar komu allar eftir skot ella diagonalbóltar móti italska brotsteiginum, og ongantíð sum úrslit av, at italska verjan varð tagað sundur.

Hinvegin var fleiri ferðir um reppið, at Italia fekk skapt sær møguleikar í kvikum mótalopum, men aloftast vórðu teir tarnaðir av belgisku rangstøðufelluni, har Inzaghi í tíð og ótíð rendi seg fastan.

Dysturin varð avgjørdur, tá Fiore eftir gott mótálop sendi bóltin hegnisliga í netið, og eftir hetta var sjónligt, at Belgia hevði mist alla vón um stig í hesum dysti.

**Zoff er á rættari leið**
Samanumtikið kann sigast, at italska landsliðið framvegis veit, hvussu ein leiðsla skal verjast, men hinvegin er spælið langt ífrá so destruktivt, sum tað fyrr hevur verið.

Enn er talan tó ikki um nakað meistaraspæl, men kanska er Zoff um at finna røttu blandingina av verju- og álopsfótbólti, soleiðis at hann enn einaferð kann føra eitt gullmerki heim til Italia, soleiðis sum hann eisini gjørdi í EM í 1968 og HM í 1982.

Hinvegin sýndi belgiska liðið í løtum, at teir allarhelst eru førir fyri at fylgja við Italia til fjórðingsfinalurnar. Megna teir á sama hátt at trýsta turkarnar í seinasta dystinum í bólkaspælnum, er í øllum førum ikki óhgusandi, at teir vinna tann dystin.

Turkiska liðið er neyvan ført fyri at spæla eins skipað í verjupartinum, sum Italia er tað, og so kann væl henda seg, at Mpenza ella onkur av liðfeløgunum finnur vegin til meskarnar.

**Matarlysturin betri**
Efitr mongu frálíku dystirnar, sum higartil hava verið í endaspælinum, er ikki løgið, um matarlysturin hjá sofaíðkarunum er betri, enn vanligt, tá talan er um endaspøl.

Komandi dagarnar er eisini tørvur á góðum matarlysti, tí á matarlepanum eru í minsta lagi tveir dystir um dagin komandi vikuna ella so.



# EURO 2000 endaspælið

## Bólkur A

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 1 | 0 | 0 | 3-2 | 3 |
| 2 Týskland | 0 | 1 | 0 | 1-1 | 1 |
| 3 Rumenia | 0 | 1 | 0 | 1-1 | 1 |
| 4. Ongland | 0 | 0 | 1 | 2-3 | 0 |

**Komandi dystir:**

17.06 Rumenia-Portugal

17.06 Ongland-Týskland

20.06 Ongland-Rumenia

20.06 Portugal-Týskland

## Bólkur B

**Italia-Belgia 2-0 (1-0)**
1-0: Totti 6.
2-0: Fiore 66.

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 2 | 0 | 0 | 4-1 | 6 |
| 2 Belgia | 1 | 0 | 1 | 2-3 | 3 |
| 3 Svøríki | 0 | 0 | 1 | 1-2 | 0 |
| 4. Turkaland | 0 | 0 | 1 | 1-2 | 0 |

**Komandi dystir:**

15.06 Svøríki-Turkaland

19.06 Turkaland-Belgia

19.06 Italia-Svøríki

## Bólkur C

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Noreg | 1 | 0 | 0 | 1-0 | 3 |
| 2 Slovenia | 0 | 1 | 0 | 3-3 | 1 |
| 3 Jugoslavia | 0 | 1 | 0 | 3-3 | 1 |
| 4 Spania | 0 | 0 | 1 | 0-1 | 0 |

**Komandi dystir:**

18.06 Slovenia-Spania

18.06 Noreg-Jugoslaivia

21.06 Jugoslavia-Spania

21.06 Slovenia-Noreg

## Bólkur D

**Støðan**

| | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Frakland | 1 | 0 | 0 | 3-0 | 3 |
| 2 Holland | 1 | 0 | 0 | 1-0 | 3 |
| 3 Kekkia | 0 | 0 | 1 | 0-1 | 0 |
| 4 Danmark | 0 | 0 | 1 | 0-3 | 0 |

**Komandi dystir:**

16.06 Kekkia-Frakland

16.06 Danmark-Holland

21.06 Danmark-Kekkia

21.06 Frakland-Holland

# EM-stubbar

*Nú øll liðini hava leikt í miunsta lagi ein dyst, hava viðhaldsfólk hjá ymsu londunum sjálvandi sína hugsan um, hvussu lið teirra hevur staðið seg og ikki minst hví*



*Ein tíma undan dystarbyrjan, løgdu italsku leikararnir blómutyssi og krans við staðið, har 39 áskoðarar lótu lív fyri 15 árum síðani*

HEINI Í SKORINI/
JÁKUP MØRK

»Keegan skuldi havt brúkt Steven Gerrard í staðin fyri Paul Ince«! Soleiðis ljóða ensku fjølmiðlarnir eftir at Ongland tapti eyðmýkjandi 3-2 eftir at hava verið á odda 2-0 í sínum fyrsta dysti ímóti Portugal.

Keegan valdi at nýta Paul Ince í byrjunaruppstillingini, og eftir at hann yvirhøvur ikki megnaði at at halda skil á serliga Luis Figo og Rui Costa, eru atfinningarnar at Keegan øðiligar.

Fólk í Onglandi halda, at Keegan skuldi latið bert 20 ára Liverpool leikaran spælt í staðin Ince, og vit fáa at síggja, hvat Keegan velur at gera, tá Ongland Leygardagin leikar móti arvafíggindunum úr Týsklandi.

Í gjár var tó líkt til, at Kevin Keegan, tó sleppur undan at taka støðu til júst hendan spurningin, tí ungi Gerrard hevur nú fingið ein skaða í lærkrikan, og tað verður mett sera ivasamt, um hann fær spælt við móti Týsklandi.

Tony Adams verður hldur ikki við vegna skaða, og har verður væntandi liðfelagi hansara úr Arsenal, Martin Keown, at síggja á liðnum. Steve McManaman er eisini skaddur, og ivasamt er, hvat Keegan ger við tað. Dennis Wise er eitt boð, meðan Nick Barmby eisini er ein møguleiki at seta inn fyri McManaman.

Um Ongland skal gera sær nakrar vónir um at koma víðari í bólkinum, mugu teir vinna á Týsklandi, og trýstið er sera stórt á Kevin Keegan.

**Camacho er í trongum skóm**
Ein annar venjari, sum ikki hevur tað so lætt í løtuni, er Spanski landsliðsvenjarin Jose Antonio Camacho, eftir at liðið hjá honum tapti nakað sensationelt á Noregi 1-0.

Málið hjá Noregi kom eftir at Spanski málverjin Molina gjørdi eitt stórt mistak, og Tottenham áleyparin Steffen Iversen kundi skalla bóltin í málið. Nógv seta eitt stórt spurnartekin við, hví Camacho valdi at lata Molina byrja í málinum, í staðin fyri so góðar málmenn sum Santiago Canizares og Iker Casillas.

Spania skal eins og Ongland helst vinna næsta dyst, um teir skulu koma víðari, ella krevur Spanska fólkið høvdið á Camacho á einum silvurfati.

**Katanec nøgdur**
Besti dysturni higartil í EM endaspælinum, var dysturin millum Jugoslavia og Slovenia. Slovenia var á odda 3-0 so seint sum í seinna hálvleiki, men Jugoslavia kom aftur, og dysturin endaði 3-3. Men hóast tað sigur bert 37 ára gamli Slovenski landsliðsvenjarin Srecko Katanec, at hann er nøgdur við úrslitið:

- Vit spældu ótrúligt í 70 minuttir, men so komu teir aftur. Tað vísir, at vit hava ov lítlar royndir á so høgum støði, men eg taki hattin av fyri mínum dreingjum. Ein javnleikur kann væl vera nóg mikið at koma víðari, segði Katanec.

**Frakland nýggjur favorittur**
Oddsini hjá ensku veddingarfyritøkunum broytast so at siga dagliga.

Nú verður mett, at Frakland er favorittur at vinna EM-heitið, og fært tú bert 2,75 ferðir pengarnar aftur, um spælt verður á verandi heimsmeistararnar. Sostatt er líkt til, at veddingarfyritøkurnar leggja lítið í, at tað ongantíð hevur eydnast einum europeiskum heimsmeistara at vinna eftirfylgjandi EM-endaspælið.

Næst størsti favoritturin er Holland, sum framvegis gevur oddsini 3,5, meðan Italia gevur pengarnar 6 ferðir aftur.

Niðast á listanum er Danmark, har pengarnir verða lætnir 150 ferðir aftur, so tað verður helst ikki roknað við, at Danmark endurtekur meistaraverkið frá 1992, tá teir bert høvdu eitt stig eftir teir báðar fyrstu dystirnar í bólkaspælinum.

**Bierhoff skaddur**
Týski liðskiparin, Oliver Bierhoff, fekk ein skaða undir venjing mikukvøldið, og verður tí ikki við á týska liðnum komandi 8-10 dagarnar.

Sostatt verður hann í fyrsta lagi at síggja á liðnum aftur í fjórðingsfinaluni, um so er, at Týskland vinnur seg fram til hesar.

**Srnicek ákærir**
Kekkiski málverjin, Pavel Srnicek, sigur, at eftir hansara fatan er talan um eina samansvørjing í UEFA, til fyrimuns fyri stóru fótbóltstjóðirnar.

Serliga eru tað tvey brotsspøkr, til Italia móti Turkalandi og tað hjá Hollandi móti kekkum, sum hava fingið sinnið á málverjanum í kók.

Hann er í øðini um, at Ronald de Boer lat seg detta í kekkiska brotsteiginum, og heldur tað vera ov vánaligt av dómaranum at døma brotsspark í slíkari støðu.

Hann endaði tó við at siga, at hann kortini var fegin um, at allur heimurin dugdi at síggja, at Holland noyddist at taka slík vápn í nýtslu fyri at fáa sigurin.

At enda kann viðmerkjast, at kekkiski málverjin einki segði um ein dyst á Svangaskarði fyri knøppum tveimum árum síðani…

**Mintust tey deyðu**
Italsku landsliðsleikararnir fingu ikki eftirlíka ynskinum um at minnast tey, sum doyðu í Heysel-vanlukkuni, við at hava tøgn í ein minutt undan dystinum móti Belgia.

Hóast hett, so mintust italsku leikarnir tey deyðu, tá teir ein tíma undan dystarbyrjan løgdu kransar framman fyri tribununa, har vanlukkan hendi.

Vanlukkan í Heysel fyri 15 árum síðani kravdi 39 mannalív.

**Matteus í øðini**
Lothar Matteus spældi sera vánaligt móti Rumenia í fyrsta EM dystinum fyri Týskland, og hann varð skiftur út í seinna hálvleiki. Hann hevur verið undir hørðum atfinningum síðani, men nú er hann troyttur av at vera syndabukkur hjá fjølmiðlunum:

- Um nakar hevur nakað ímóti mær, kann hann koma og siga tað við meg persónliga, og er totir viðkomandi ikki einsamallur, kann hann biðja fimm aðrar koma við sær, segði Lothar Matteus á enum tíðíndafundi.

**Mihajlovic missur ein dyst**
Sinisa Mihajlovic er leikbannaður í einum dysti, eftir at hann fekk reyða korti móti Slovenia týskvøldi.

Fleiri høvdu væntað, at hann skuldi sita uttanfyri í meiri enn ein dyst, men dómurin er so bert tann eini dystur frá áskoðaraplássunum fyri frísparksserfrøðingin Mihajlovic. Men tað er ein ógvuliga týðandi dystur hann er noyddur at hyggja at, og tað er dysturin móti Noregi, sum jú vann sera óvæntað á Spania. Tað kann gerast ein dyggur smeitur fyri Jugoslavia at vera Mihajlovic fyri uttan eftir vánaliga úrsliti, 3-3, móti Slovenia.

**Henry favorittur til "Golden Boot"**
Eftir frálíka avrikið hjá Fraklandi og Thierry Henry í 3-0 sigrinum á Danmark, er Arsenal áleyparin nú favoritturin at gerast toppskjútti í kappingini. Oddsini at Henry gerst toppskjútti eru 9-2, meðan hollendarin Patrick Kluivert og spaniólin Raul eru á ávikavist øðrum og triðja plássi.

Áðrenn kappingin byrjaði vóru oddsini fyri Alan Shearer sum toppskjútta 12-1, meðan tey eftir vánaliga avrikið móti Portugal bert eru 20-1.

Savo Milosevic og Zlatko Zahovic eru eisini komnir langt upp á listan at gerast toppskjúttar hjá veddingarfeløgunum, eftir at hesir báðir skoraðu tvey mál í part fyrsta dysti sínum.



*Kekkiski málverjin er í øðini um brotssparkið, sum Holland fekk móti Kekkia, og rópar tað fyri eina samansvørjing millum stóru fótbóltstjóðirnar*